# í Norðoyggjum

fyrimunur, at ein kann bæði vera saman við og at vera uttan fólk.”

### Fyrstur nakrantíð gjøgnum Mykines

Upprunaliga skuldi Paul einans vera í Føroyum í ein mánað. Men tá hann sá, hvussu nógv tað er at uppliva í Føroyum, valdi hann at útseta fráferðina, so hann kom at vera í Føroyum í tveir og ein hálvan mánað í staðin.

”Føroyar eru eitt satt paradís fyri ævintýrarar. Tá eg fari úr Føroyum aftur, hækka mínir møguleikar at blíva 42 ár,” sigur Paul skemtandi og sipar til, at hann meira enn einaferð hevur verið í stórum vanda í Føroyum.

”Orsøkin, at eg so ofta eri í lívsvanda, er, at eg altíð fari eitt stig longur, enn ráðiligt er. Eitt nú tá eg skuldi taka myndir av lundunum í Mykines, fór eg heilt ytst út á eggina fyri at fáa eina góða mynd.”

Júst Mykines er serstakliga minnisvert pláss fyri Paul.

”Mín besta uppliving í Føroyum er Mykines. Eg havi verið í Mykines heilar fýra ferðir. Har er so vakurt og áhugavert, at tað er allar vitjaninar vert. Eg varð heilt skelkaður, tá eg hoyrdi, at meginparturin av føroyingum ongantíð hevur verið úti í Mykinesi. Teir burdu skamma seg,” sigur Paul og ristir við høvdinum.

”Fyrstu ferð eg fór út til Mykinesar, fór eg við kajakkini. Túrurin gekk væl, hóast hann mátti planleggjast væl við atliti til kyrrindir og streym. Men tá eg kom út til Mykinesar og sá ta lítlu og veðurútsettu havnina, segði eg í filmstólið, at tað nokk verður torførari at koma úr Mykinesi enn til Mykinesar,” sigur Paul skemtandi.

Millum Mykines og Mykineshólm er ein grotta, sum fer allan vegin tvørtur ígjøgnum oynna. Staddur við grottumunnan hómast eitt lítið ljós í hinum endanum. Men eingin hevur nakrantíð hættað sær at fara gjøgnum hesa grottu.

”Eg helt hesa grottuna ljóða í so ótrúliga, at eg mátti sjálvur fara at hyggja eftir henni. Eg byrji við at rógva heilt tætt at munnanum. Grottan sær heilt vanllig út, til eg komi heilt tætt. Tá síggi eg við mínum egnu eygum, at ljós er fyri endan. Eg rógvi eitt lítið sindur inn í grottuna, men gloymi at taka hædd fyri, at har er streymur. Alt í einum fær streymurin fatur á mær og byrjar at draga meg inn í grottuna. Eg skilji, at tað ikki nyttar mær nakað at royna at rógva ímóti, so eg kann ikki gera annað enn at lata streymin taka meg. Hjartað bankar títtari og títtari, tí alla tíðina liggur tað í mínum tonkum, at eingin hevur nakrantíð verið gjøgnum grottuna fyrr. Umleið hundrað metrar inni byrji eg at merkja, at veggirnar smalkast, og tað er ikki stórt meir enn ein manshædd til loftið. Adrenalinið pumpar øgiligt í kroppinum hesa løtuna, tá grottan her ikki er nógv meir enn hálvan metur breið. Óneyðugt at siga nýti eg alla orku og konsentratión uppá at halda meg burtur frá veggjunum, so kajakkin ikki skal fara í sor.

Komin longur inn verður tað bølmyrkt, og nú sikti eg bara eftir ljósinum, sum einans speglast í bylgjunum. Brádliga byrjar at breiðkast aftur, kanska einar fýra metrar, og eg byrji at trúgva uppá, at tað ber til. Eftir trý hundrað metrar gjøgnum oynna ella hólman, nærkist eg hinari síðuni. Satt at siga var største stúranin, um eg fekk alt upp á film,” greiðir Paul frá á ein slíkan lívligan og dramatiskan hátt, at ein fær kensluna av at sjálvur at vera har.



*Grottan gjøgnum Mykines, ið Paul sum fyrstur nakrantíð róði ígjøgnum*

### Í havsneyð í Norðoyggjum

Dramatiski túrurin gjøgnum Mykines er ikki tann einasti, sum Paul hevur verið út fyri í Føroyum. Nakrar dagar eftir hendan túrin fór Paul til Hvannasunds, har hann skuldi rógva kajakk norðanfyri. Har kundi alt eisini lættliga fingið ein bráan enda.

”Eg hevði hugt eftir veðurforsøgnunum, og sambært teimum skuldi tað vera gott veður og góður streymur. Men sum eg